

*HB leikarar frøast í Fuglafirði. Føroyameistararnir vunnu trupla dystin við tveimum málum móti einum*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

# HB ræðist ongan

**VODAFONEDEILDIN** Hallur Danielsen, annar av venjarunum hjá HB, staðfestir, at føroyameistararnir ræðast ongan

Uni Holm Johannesen

| | |
|---|---|
| ÍF | 1 |
| HB | 2 |

Hallur Danielsen er greiður.

– Vit ræðast ongan. Men vit vita, at tað er ein torførur dystur, sum bíðar okkum, og vit skulu geva alt, sum vit eiga, sigur hann.

Tað var væntað undan dystinum í gjár, at HB kom í hesa støðuna.

HB kann endurvinna føroyameistaraheitið leygardagin. Men tað er nærmast eitt krav, at reyðu og svørtu havnarmenninir fáa stig í grannadystinum móti B36. Um EB/Streymur snávar á heimavølli móti B68, so hevur úrslitið í Gundadali ongan týdning.

Seinast HB vann á B36 var 19. oktober í 2008.

Tað eru hagtøl, sum Hallur Danielsen ikki hugsar stórvegis um.

– Í HB hugsa vit bara um at vinna, og vit ætla okkum at staðfesta gullmerkini við einum sigri, sigur hann.

### Óneyðuga tætt

HB vann í Fuglafirði í gjár.

Verandi føroyameistararnir hava ofta havt trupulleikar á Fløtugerði, men HB hóraði undan hesaferð. Heimaliðið hjálpi væl.

Høgni Zachariasen, ÍF, legði gestirnar á odda, tá lítil løta restaði í av fyrra hálvleiki. Zachariasen, sum spældi í miðverjuni, stýrdi bóltinum í máli, sum hann hevði hildið gestunum frá løtuna áðrenn. Rókur av Fløtum Jespersen slapp framvið Jákupi Mikkelsen, og úr spískum sendi hann bóltin móti málinum. Fleiri mettu, at leðurkúlan hevði kós framvið málinum, tá Høgni Zachariasen sendi í netið.

Fróði Benjaminsen økti við brotssparki í seinna hálvleiki.

Hallur Danielsen hevur verið hjálparvenjari hjá Juliani Hansen, síðan Kristján Guðmundsson varð sendur til hús í september.

– Vit vilja spælt bólt, og tað er umráðandi, at vit eru omaná leikliga í hvørjum dysti. Tað hevur eydnaðist væl higartil, men vit vóru lítið sannførandi í dag. Vit greiddu hinvegin okkara fremsta skyldu og fingu stigini, sigur Hallur Danielsen.

ÍF svaraði aftur beinanvegin, at HB hevði økt um leiðsluna.

Áki Petersen royndi seg við skoti úr 20 metrum, og umvegis Øssur Dalbúð, fór bólturin fram við Marcin Dawid.

– Vit hava tamarhald á støðuni, og málið kemur nærmast burtur úr ongum. Vit verða settir undir óneyðugt trýst seinastu løtuna. Tað er ikki fyrstu ferð í hesum kappingarárinum, at HB fær óneyðugt mál ígjøgnum og má stríða seg til sigurin seinastu løtuna. Tað er avgjørt nakað, sum liðið skal hugsa meira um til næsta kappingarár, sigur Hallur Danielsen.

> **Í HB hugsa vit bara um at vinna, og vit ætla okkum at staðfesta gullmerkini við einum sigri leygardagin**

### Gingið sera væl

Julian Hansen og Hallur Danielsen tóku um endan, tá HB skuldi spæla torførastu dystirnar.

Tað hevur gingið væl.

Nú kann mest vinnandi felagið í landinum avgera føroyameistaraheitið.

Tað er ein støða, sum venjararnir ikki hugsaðu stórvegis um tann 13. september í ár, tá leiðslan heitti á teir at loysa Kristján Guðmundsson av.

– Vit vildu fremst av øllum verða meira støðugir í avrikunum og fáa eyðkenda og álopssinnaða HB-spælið framaftur. Tað hevur riggað væl, og nú eru vit komnir so mikið langt, at vit kunnu vinna meistaraheitið, greiðir Hallur Danielsen frá.

HB kann leygardagin vinna sítt føroyameistaraheitið nummar 21.

*uni@sosialurin.fo*

### 13 stig í fimm dystum

Tað hevur gingið væl hjá HB, síðan Julian Hansen og Hallur Danielsen tóku við sum venjarar. Her er yvirlit yvir dystirnar, har teir hava staðið á odda fyri liðnum.

- **19. sep: Víkingur - HB 0-1**
- **22. sep: HB - AB 3-0**
- **27. sep: EB/Str. - HB 1-1**
- **2. okt: HB - NSÍ 3-2**
- **17. okt: ÍF - HB 1-2**